# Eg havi ongantíð havt so góðan stuðul sum nú

**Kaj Leo Johannesen følir seg væl í formanssessininum í sambandsflokkinum, tí hann hevur ongantíð følt so góðan stuðul sum akkurát nú**

SAMBANDS-
FLOKKURIN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Eg føli, at eg havi ongantíð havt so góðan stuðul í sambandsflokkinum, sum akkurát nú.

Kaj Leo Johannesen følir seg hampiliga tryggan í formanssessinum í sambandsflokkinum.

Tað ger hann, hóast tveir av tingmonnum flokksins, Edmund Joensen og Johan Dahl, beint eftir fólkatingsvalið góvu ilt av sær og róðu framundir, at leiðsluspurningurin í flokkinum átti at verðið viðgjørdur av nýggjum.

Sambandsflokkurin fekk ein frammaná ávalinum. Hann ikki bara misti fólkatingssessin, men hann gjørdust enntá minstur av teimum fýra stóru flokkunum. Tað fekk tingmenn í flokkinum at lufta tankan í Útvarpinum og í Sosialinum um at fáa annan formann at standa á odda fyri sambandsflokkinum í royndunum at fáa hann at veksa seg stóran aftur.

Sjálvur helt Kaj Leo beint eftir valið, at tað, sum flokkurin hevur mest brúk fyri, er tryggleiki og tað skapar ikki tryggleika at skifta formann annaðhvørt ár. Hann helt eisini at hann átti at fáa eina rímiliga tíð til at byggja flokkin uppaftur.

Tí ætlaði hann sær ikki at leggja kongin, sum formaður sambandsfloksins.



*–Eg tæni flokkinum, so leingi eg verðið biðin um tað. Tá ið tann dagur kemur, at flokkurin heldur, at onkur annar skal tæna flokkinum, fari eg at stuðla tí fult út, sigur Kaj Leo Johannesen, formaður í sambandsflokkinum*

### Ongantíð so góðan stuðul sum nú

Og hetta stendur hann við, hóast tveir av tingmonnum floksins hava gloppa dyrnar fyri at skifta formann.

Hann ger vart við, at hann hevur ongar viðmerkingar til smálutirnar í tí, sum tingmenninir halda um leiðsluspurningin í sambandsflokkinum.

– Ónøgd í flokkinum skal viðgerast innanhýsis, sigur Kaj Leo Johannesen.

Men hann leggur afturat, at ein floksformaður verður vigaður einaferð um árið, tá ið flokkurin hevur landsfund.

Og tá er ein og hvør vælkomin at bjóða seg fram at verða formaður og so verður valt sum tað eigur í einum fólkaræði, har tann, sum fær meirlutan, vinnur valið.

– Eg eri biðin um at tæna flokkinum og tað geri eg, til flokkurin heldur, at onkur annar skal tæna flokkinum. Og tá ið tann dagur verður, fari eg at stuðla honum ella henni fult út, sum skal taka við eftir meg.

Kaj Leo Johannesen sigur, at hann er sum japanarar: Teir byrja við at sópa gólv, so arbeiða teir seg uppeftir, men teir enda aftur við at sópa gólv.

Tað góðtaka teir og tað geri eg eisini og eg fari altíð at stuðla teirri avgerð 100% sum valfeløgini kring landið gera av.

Men í løtuni kennir Kaj Leo Johannesen seg ikki bara at hava stuðul frá valfeløgunum kring landið. Hann heldur enntá, at hann hevur ongantíð havt so góðan stuðul sum akkurát nú.

– At tað so einstakir limir, sum eru ónøgdir, slepst neyvan undan, men tað ætli eg mær at viðgera innanhýsis.

Hann ásannar eisini, at tær ósemjur, sum hava verið í flokkinum, hava neyvan tænt honum.

Hann ásannar eisini, at uppstillingin í Suðurstreymoy er ikki nóg sterk.

– Tí skulu vit gera okkum størri ómak at finna eitt størri tal av væl skikkaðum valevnunum.

Kortini vil hann ikki ásanna, at seinasta løgtingsval var so vánaligt hjá sambandsflokkinum.

– Vit høvdu eitt tað besta úrslitið seinastu 20 árini. Men tíverri varð úrslitið mett útfrá eini veljarakanning, sum gav okkum næstan 30% av atkvøðunum. Og afturímóti veljarakanningini, var valið ikki gott. Men tað er iki rætt at meta úrslitið útfrá eini veljarakanning, sigur Kaj Leo Johannesen.

# Stórfingin konsert við Eivør Pálsdóttir

Leygardagin klokkan 17 verður stórfingin konsert í Norðurlandahúsinum, har Eivør Pálsdóttir og íslendski KaSahópurin fara at spæla og syngja.

Hetta er eitt sjálvsagt høvi at hoyra Eivør Pálsdóttir, nú hon er aktuel við fløguni við DR BigBand, sigur Norðurlandahúsið

Í KaSahópinum eru fimm kvinnur: Nína Margrét Grímsdóttir, ið spælir klaver, Sif M. Tulinius og Helga Þórarinsdóttir, ið báðar spæla violin, Áshildur Haraldsdóttir, ið spælir floytu og Bryndis Björgvinsdóttir ið spælir cello.

– Tað er nakað heilt serstakt við Eivør. Hon er sum ein kamelón, ið skiftir ham.Við Clickhaze kann hon vera vill, sjálv ger hon inniligar kensluborin sangir, og nú hoyrist hon eisini í klassiskum høpi. Tað krevur eina sanna stjørnu, sigur Norðurlandahúsið!

KaSahópurinn varð stovnaður í 2001, og síðani hevur hann havt nógvar konsertir bæði í Íslandi og aðrastaðnis, eitt nú í Japan. Á Føroyaferðini hjá Eivør og KaSahópinum, verður bara hendan eina konsertin, so tað ræður um at liggja framvið.

Atgongumerki fáast til keyps í Norðurlandahúsinum, og á Kunningarstovunum í Runavík og Havn.



*Hetta er KaSahópurin, ið skal spæla saman við Eivør í Norðurlandshúsinum í annaðkvøld: Nína Margrét Grímsdóttir, spælir klaver, Sif M. Tulinius og Helga Þórarinsdóttir, spæla violin, Áshildur Haraldsdóttir, spælir floytu og Bryndis Björgvinsdóttir spælir cello*

# Tobbi aftur framsøgumaður

**Torbjørn Jacobsen skuldi á løgtingsfundi seinnapartin hósdagin aftur vera framsøgumaður fyri Tjóðveldisflokkin, og harvið var hann aftur partur av tingbólkinum hjá Tjóðveldisflokkinum**

SEMJA
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Viðurskiftini í Tjóðveldisflokkinum eru við at normalisera seg aftur. Stríðið millum formannin og løgtingsmannin Torbjørn Jacobsen hevur órógvað flokkin í fleiri mánaðir, men frálíka fólkatingsvalið hjá flokkinum og ikki minst teimum báðum politikarunum skapti grundarlag fyri varðandi friði í flokkinum.

### Aftur framsøgumaður

Meðan stríðið var í hæddini slapp Torbjørn Jacobsen ikki at vera framsøgumaður fyri Tjóðveldisflokkin í vinnumálum og mentamálum, sum hann annars hevði verið, og hann misti eisini sessin sum næstformaður í flokkinum.

Karsten Hansen er nú næstformaður, og tað heldur hann fram við, men á løgtingsfundi seinnapartin hósdagin skuldi Torbjørn Jacobsen aftur verða framsøgumaður fyri Tjóðveldisflokkin, og harvið má hann aftur metast sum partur av tingbólkinum hjá Tjóðveldisflokkinum.

### Leiðslan tigur

– Eg haldi, at viðurskiftini í flokkinum eru við at koma í rættlag aftur nú, sigur Torbjørn Jacobsen.

Hann skuldi vera framsøgumaður fyri Tjóðveldisflokkinum í einum tingmáli um avtøku av eini løgtingslóg um inn- og útflutning av fiski og fiska-úrdráttum.

Formaðurin í Tjóðveldisflokkinum, Høgni Hoydal, hevði ikki stundir at tosa við Sosialin fyrrapartin hósdagin. Og tað hevði formaðurin fyri aðalstjórnina í flokkinum heldur ikki. Aðalstjórnin hevði fund mikukvøldið, men formaðurin Jóannes Dalsgarð segði, at málið um Torbjørn Jacobsen stóð ikki á skránni fyri fundin.